Kommunufelagið

FØROYA GJALDSTOVA
TRAÐAGØTA 39
POSTBOX 2009
165 ARGIR

Dagfesting
17. februar 2017

Okkara j.nr.
17/00489-2

Málsviðgeri: Eyðun Christiansen

Tygara j.nr. 17/00020

***Viðv. rundskrivi um at tíðaravmarka lønir í roknskapinum hjá kommunum og kommunalum samstørvum.***

Fíggjarmálaráðið hevur 16. januar 2017 sent út rundskriv um at tíðaravmarka lønir í roknskapinum hjá kommunum og kommunalum samstørvum. Okkum kunnugt hava onkrar kommunur fingið skrivið seint fríggjadag 20 januar, og aðrar hava fingið skrivið mánadagin 23. januar.

Í fylgibrævi til rundskrivið verður viðmerkt, at tað er ymiskt, hvussu stovnar, kommunur og samstørv hava tikið lønarskylduna um ársskiftið við í roknskapin og fyri at fáa greiðu á hesum, hevur Fíggjarmálaráðið í rundskrivinum og viðløgdu talvu ásett, hvussu lønarskyldur skulu skrásetast, umframt at upplýst verður, at ásetingarnar komu í gildi fyri roknskapin fyri árið 2016.

**Ongin hoyring**
Fyrst er at siga, at umrødda rundskriv er sent kommununum einaferð millum 20. og 23. januar 2017. Tað er dagfest 16. januar 2017, og er ætlað at koma í gildi sama dag, og at hava gildi afturvirkandi, t.v.s. fyri alt fíggjarárið 2016.

Harumframt vilja vit vísa á, at rundskrivið ikki varð sent Kommunufelagnum (ella einstøku kommununum) til ummælis, *áðrenn* tað varð sett í gildi, hóast at § 3, stk. 6. í Kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna greitt ásetir, at landsstýrismaðurin skal altíð hoyra kommunurnar áðrenn týðandi broytingar verða settar í verk.

Eitt er, hvussu landsins myndugleikar skriva út reglur til undirskipaðar myndugleikar, men í hesum føri er talan um bindandi reglur fyri allar kommunur og kommunal samstørv. Tá kann tað undir ongum umstøðum góðtakast, at nýggjar ella fleiri reglur verða ásettar um viðurskifti av týdningi fyri kommunurnar, uttan at kommunurnar eru hoyrdar um hetta frammanundan.

Kommunufelagið skal tí harðliga átala framferðarháttin, har landsstýrið uttan orð ella eið setir nýggjar og fleiri reglur í gildi á kommunala økinum.

Viðvíkjandi innihaldi og formi hevur Kommunufelagið annars hesar viðmerkingar.

**Rundskriv til kommunur**
Fyrst skal undirstrikast, at kommunur og kommunalir felagsskapir eru sjálvstøðugar fyrisitingarligar eindir. Tað merkir, at landsmyndugleikar ikki uttan víðari kunnu geva kommunalum myndugleikum tænastuboð í ítøkiligum ella í meira víðfevndum viðurskiftum, uttan at greið lógarheimild er fyri tí.

Rundskriv verða vanliga bert nýtt til tænastuboð í breiðari merking, t.v.s. bindandi ásetingar í síni heild, sum bara venda sær móti undirliggjandi stovnum ella starvsfólkum.

Vanliga er ikki vegleiðandi tilfar í rundskrivum, og tá rundskriv eru ætlað at innihalda bindandi rættarreglur, er vanligt at býta rundskriv upp í greinar og stykki, t.v.s. at rundskriv verða sett upp eftir sama leisti sum kunngerðir.

Kommunufelagið metir ikki, at røtt mannagongd er at vísa til eina kunngerðarheimild, tá ið rundskriv verða skrivað til kommunurnar.

Havast má í huga, at kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna hevur heimild í kommunustýrislógini, § 47, men § 47 heimilar ikki, at tað í øðrum reglum – vanliga kunngerð - verða ásettar heimildir um, at landsstýrið kann áseta bindandi reglur í t.d. rundskrivi at galda fyri allar kommunur.

Leitast má tí aftur til heimildina í § 47 í mun til tað, sum ásett verður.

Sambært nevnda rundskrivi frá 16. januar 2017 er tað eisini so, at fleiri av brotunum ikki eru tað, sum vanliga verður lýst sum ásetingar, tí røtt verður um tøkniligar meirútreiðslur orsakað av broytingunum (t.v.s. at hetta er ikki nakað, sum vanliga kann lýsast sum regulering).

**Kunngerð heldur enn rundskriv**
Eitt er, at ivasamt er í mun til heimildina at nýta rundskrivsformin mótvegis kommunum í hesum føri.

Annað er, at tær reglur, sum eru galdandi fyri kommunurnar í roknskaparhøpi gerast óneyðuga fløktar og ógreiðar, um arbeitt bæði verður við einari formliga lýstari kunngerð og so einum meira leyst orðaðum rundskrivi, sum er sett upp í óbundnum máli heldur enn í kunngerðar-formi.

Um Fíggjarmálaráðið heldur fast við, at omanfyri nevndu reglur skulu lýsast at vera galdandi fyri kommunurnar, verður heitt á Fíggjarmálaráðið um at taka reglurnar við í ta kunngerð, sum longu er lýst á økinum, soleiðis at regluverkið, ið kommunurnar skulu arbeiða eftir, ikki gerst óneyðuga fløkt.

Talan er undir øllum umstøðum um somu lógarheimild, § 47 í kommunulógini, sum liggur aftanfyri ta regulering, sum gerast skal. Hetta talar greitt fyri at samla reglurnar í einari og somu kunngerð, heldur enn at fløkjast í kunngerð og rundskrivum.

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

**Afturvirkandi gildi**
At enda skal verða viðmerkt, at Kommunufelagið undrast stórliga á, hví rundskriv skal verða sent út tann 20. ella 23. januar at koma í gildi 16. januar 2017, og sum hartil skal vera galdandi fyri farna fíggjarárið 2016.

Hóast fíggjarárið fyri 2016 enn er opið, so er púra greitt talan um reglur, sum hava afturvirkandi gildi í meira enn eitt ár. Eingin heimild er til slíka inntrívandi regulering í § 47, og als ikki, um talan er um regulering, sum verður lýst í rundskrivi.

Kommunufelagið sær heldur onga orsøk til at fara so harðliga fram, frá einum formligum sjónarhorni, tí flestu kommunur arbeiða okkum vitandi eftir tí leisti, sum fyriskrivaður verður í rundskrivinum, men av tí at allar kommunur ikki hava gjørt tað í øllum viðurskiftum, vil tað skapa óneyðugar meirútreiðslur og meirarbeiði at skula rætta viðurskiftini aftur í tíð fyri 2016 eisini.

Kommunufelagið sær tí onga orsøk til, at kunngerðin ikki kann verða broytt og hava gildi fyri roknskaparárið 2017, sum júst er byrjað, og so slepst eisini undan ódámligari regulering við afturvirkandi gildi, tá tørvur ikki er á tí.

**Samanumtikið**
Samanumtikið verður tí heitt á Fíggjarmálaráðið um at strika nevnda rundskriv ella í øðrum lagi at loyva frávikum fyrsta árið. Um tørvur er á reglunum framyvir, so at lýsa tær sum broyting til kunngerð nr. 89 frá 5. oktober 2008, at koma í gildi og hava virknað fyri framtíðina, heldur enn afturvirkandi í meira enn 1 ár.

Vegna
Kommunufelagið

Dennis Holm
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo